# Sosialurin

Nr. 187 • fríggjadagur • 3. oktober 2003 • 77. árgangur • Kr. 12,00

www.sosialurin.fo




**VÍF fær nýggjar útlendingar**

síða 18

# Fíggjarlógin ridlar

**Samgongan er ikki samd um, at Føroya Tele skal rinda vinningsbýti komandi ár. Og Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, er ímóti, at Barsilsskipanin verður flutt á partarnar á arbeiðsmarknaðinum ígjøgnum fíggjarlógina**

FÍGGJARLÓG

*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Fíggjarlógin er sum ein illa seymað rullipylsa, sum dettur sundur, tá hon fer í grýtuna.

Soleiðis tók ein politiskur skemtari til, tá fíggjarlógin varð almannakunngjørd týsdagin. Og líkt er til, at tað eru viðurskifti, sum kunnu fáa vakra avlopið á 100 milliónir krónur at ridla, tá lógin kemur í løgtingið. Í øllum førum er greitt, at semja ikki er í samgonguni um allar postar í fíggjarlógini.

Bjarni Djurholm landsstýrismaður hevur í einum brævi til Fíggjarmálaráðið gjørt greitt, at hann ikki góðtekur upphæddir á hansara øki, sum eru settar í fíggjarlógina ímóti viljanum hjá Vinnumálaráðnum.

Í einum brævi frá 18. september til Fíggjarmálaráðið sigur hann, at hann ikki tekur undir við, at barsilsskipanin verður løgd út á partarnar á arbeiðsmarknaðinum uttan víðari. Og í somu vending mótmælir hann, at Fíggjarmálaráðið hevur álagt Føroya Tele at rinda 17 milliónir krónur í vinningsbýti næsta ár. Hetta eru viðurskifti, sum hava ávirkan á bæði inntøkur og útreiðslur á fíggjarlógini fyri 2004.

»Undirritaði er av tí fatan, at skal barsilsskipanin leggjast út til partarnar á arbeiðsmarknaðinum at gjalda og umsita, so skal hetta gerast í samráð við arbeiðsmarknaðin og ikki sum partur av fíggjarlógaruppskoti«, skrivar hann.

Greitt tykist sostatt, at tað ikki er ein avtala, sum øll samgongan hevur gjørt, at Føroya Tele skal rinda 17 milliónir krónur í vinningsbýti. Og ivasamt er somuleiðis, um undirtøka fæst fyri at hækka gjaldið hjá løntakarum og arbeiðsgevarum til barsilsskipanina úr 0,25 prosentum upp í 0,40 prosent av lønini.

síða 5



Framstig fyri diabetikarar:

## Landsstýrismaðurin tekur nýggj stig

síða 3



Tordur á 20 ára degnum:

## Trivnaður kemur ikki av sær sjálvum

síða 14



Arbeiðsmarknaður:

## Nýggj skipan innan eitt ár

síða 4

# Strok uttan byrjan ella enda

Leygardegin letur upp framsýning við listarverkum hjá Hansinu Iversen upp í Listaskálanum í Havn. Hansina sigur um myndirnar, at tær eru gjørdar við júst tí rúminum í huga, har tær koma at hanga. Strokini, litirnir og formarnir fevna rúmið við rørslu, sum hvørki endar ella byrjar

síða 2




COMPAQ Local Service Partner

hp invent

Video kanónir
Digital fototól
Scannarar
Printarar
Tónarar og patrónir
Kopipappír

www.com-data.fo

COM-DATA
Klaksvík tlf. 476100 Saltangará tlf. 449840

Haldarar hjá Sosialinum



ið ikki fáa leygardagsblaðið verða bidnir um at ringja tel 229725 leygardag millum kl. 11 og 14

Prentmiðstøðin



Ryggbelti

Ergo & Hjálpartól

J.C. Svabosgøta 8
FR-100 Tórshavn
Tel. 315 777 • Fax 315 772
Fartel. 215 778

Krosstein www.krosstein.fo

Pf. Svend

Alt til veiðimannin

• Patrónir og byrsur
• Taskur, reimar og viðlíkahald



VHS Alt tilfar til VATN · HITAVERK · SANITET · VENTILATIÓN

Falkavegur 6 · FO-110 Tórshavn
Tel. 34 46 00 · Fax. 34 46 01
E-mail: krosstein@krosstein.fo

Sosialurin 341800